

Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petoleum, á framløguni í Oslo í morgun. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Ein tungur ársfjórðingur hjá Atlantic Petroleum

**Jógvan Hugo Gardar**

27.05.2015 - 14:50

Oljan.fo

Fyrrapartin almannakunngjørdi Atlantic Petroleum sín rokniskap fyri fyrsta ársfjórðing í ár. Og tað var ikki nógv jaligt Ben Arabo, stjóri, kundi siga um gongdina fyrstu tríggjar mánaðirnar í ár.

- Framleiðslan hevur ikki gingið eftir vild, og tað sama kunnu vit siga um prísin á olju, segði Ben Arabo, tá hann legði fram rokniskapin í Oslo í morgun.

Framleiðslan fyrstu tríggjar mánaðirnar í ár var 106.000 føt av oljulíkum. Hetta er minni enn tað ein hevði roknað við. Orsøkin til lægri framleiðslu er serliga Chestnut, har viðlíkahald gjørdi at framleiðslan bara gjørdist umleið helvtina av tí sum kann framleiðast har.

Inntøkurnar vóru góðar 39 milliónir danskar krónur, og var hetta minni enn metingarnar frammanundan søgdu. Orsøkin er lági oljuprísurin og framleiðsland sum ikki gav tað sum tey roknaðu við. Netto undirskotið fyri ársfjóðringin gjørdist 11,7 milliónir krónur.

Beint áðrenn framløguna í morgun boðaði Atlantic Petroleum frá at tey taka seg úr Roald Rygg-loyvinum.

- Vit høvdu stórar vónir til Roald Rygg, og hava tað enn. Men metingarnar sum vit hava gjørt gera at velja at taka okkum úr hesum loyvinum nú. Orsøkin er at hetta ikki passar heilt hjá okkum sum støðan er. Tað kann ganga rúm tíð áðrenn hetta kemur at geva yvirskot. Vit ynskja at gangnýta okkara tilfeingi best møguligt, og við dagsins oljuprísum vil Roald Rygg ikki passa inn her, sigur Ben Arabo.

- Í staðin skal Atlantic Petroleum nú savna orkuna um tær ætlanir sum eru í gongd, og har vit meta at meir fast burturúr framleiðsluni undir verandi umstøðum, segði Ben Arabo.